# 1 mió. ferðandi til Norðurlond í 2016

**- Hetta er eitt høgt mál at seta okkum. Men vit síggja greitt, hvussu talið av ferðafólkum økist ár undan ári, sigur Magnus Oddsson, oddamaður fyri ferðavinnustevnuna Vestnorden Trvael Mart.**
**Stóra ferðavinnu-stevnan byrjaði í gjárkvøldið í Laugardalshøllini í íslendska høvuðs-staðnum. Hetta er 21. ferðin at henda stevnan verður hildin.**

FERÐAVINNUSTEVNA
*Orð og mynd: Snorri Brend*

**Reykjavík:** - Hesi seinastu árini er talið av ferðafólkum í Norðurhøvum tvífaldað ár undan ári.

- Hetta er nakað sum vit fegnast um. Samstundis setir hetta stór krøv til okkum um at hava nakað at bjóða teim ferðandi. Tað er ikki nóg mikið bara at fáa tey til okkum. Tey mugu eisini sleppa at uppliva okkurt, sigur Magnus Oddsson.

Vøksturin í talinum av ferðafólkum hevur verið so stórur, at higartil í ár hava eini 500.000 vitjandi íalt verið í Føroyum, Íslandi, Hetlandi og Grønlandi.

Her verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at hava so nógv og so fjølbroytt úrval av tilboðum til tey ferðandi. Ein tann størsta avbjóðingin er helst hon at fáa hesi ferðafólkini at koma til londini gjøgnum alt árið.

Hetta hevur eydnast í Íslandi, har ein í vetur hevði fleiri ferðafólk enn í summar. Og sum skilst eru eisini ætlanir um hetta í hinum londunum í hesum samstarvinum innan ferðavinnuna.

Eisini í Føroyum hevur ein merkt hesa somu gongdina sum hjá grannunum fyri norðan og fyri sunnan.

- Hetta hevur verið eitt gott ár hjá føroysku ferða-vinnuni á øllum økjum – kanska tað besta nakrantíð, sigur Per Hansen, stjóri í Ferðaráðnum.



*Nógvir løkir smáir gerast stórar áir. Hetta ger seg eisini galdandi innan ferðavinnuna í Føroyum. – Vit hava havt okkara besta ár nakrantíð, sigur Per Hansen (uttast høgrumegin), stjóri í Ferðaráðnum*

### Stór øking

Á tíðindafundi í morgun vísti Per Hansen á, at bæði innan samferðslu, gist-ing og í talinum av ferða-mannaskipum.

Hann vísti á, at vøksturin í flogferðsluni hevur verið 13 %, 30 % hjá Smyril Line, 10 % í gistingum og 10 % fleiri ferðamannaskip hava verið her í mun til í fjør.

- Hetta gevur okkum áræði at halda fram í arbeiðinum at menna okkum sum ferðavinnuland, legði hann dent á.

Ein slíkur vøkstur kemur ikki av sær sjálvum, men er eitt úrslit av teirri markn-aðarføringini sum hevur verið gjørd tey seinnu árini – á ymiskum støðum og á ymiskan hátt.

Eisini tær støðugu íløg-urnar innan samferðsluna hava gjørt sítt hertil:

FaroeJet er farið at flúgva. Atlantsflog hevur økt túra-talið. Norðoyatunnilin er latin upp. Nýggjur Smyril er komin. Íløgur verða gjørdar innan hotell- og gistingarhúsini í Føroyum.

Eitt stórt arbeiði verður eisini gjørt á mongum støðum kring landið, har fólk við áræði og hugskotum fara undir tiltøk til tess at bjóða teim ferðandi nøkur serstøk upplivilsir.

- Ein partur av føroysku marknaðarføringini eru eisini teir nógvu tónleika-festivalarnir kring oyggj-arnar. Her koma bæði kend útlendsk og heimlig nøvn fram, og er hetta eisini við til at marknaðarføra okkum sum ferðamannaland, segði Per Hansen á tíðinda-fundinum.

### Fótbóltur og ferðafólk

Nú er summarið farið at halla og fólk innan ferða-vinnuna eru so smátt farin at hugsa um komandi summar.

Eitt sum heilt víst fer at seta dám á ferávinnuna komandi ár er fótbólturin – í hesum føri undankappingin til heimsmeistarakappingina í fótbólti.

- Komandi ár fáa vit vitjan av bæði Skotlandi, Ukraina og av Fraklandi. So hetta fer at geva okkum stóra umtalu úti í heimi, segði Per Hansen.

Vinna vit onkran dyst ella fáa gott úrslit ímóti Fraklandi, so fer tað av álvara at seta okkum á heimskortið!




Marknaðarrák

## Oljuprísurin lækkar

Prísurin á olju er lækkaður um 20% síðan miðan august. Brent oljan kostar nú um 64 dollarar fyri tunnuna. Tað tykist serliga vera støðan í Iran, sum elvir til lækkandi prísin. Iranar eru blotnaðir, og hava nú bjóðað ES at steðga við kjarnorkuroyndunum í tveir mánaðir. Í hesum sambandi er eisini vert at leggja til merkis, at OPEC heldur fast við at framleiða 28 mió. tunnur um dagin, hóast prísurin er nógv lækkaður. Ótti var annars fyri, at OPEC kundi minka um framleiðsluna, so hvørt sum prísurin lækkaði. Enn eru tó ikki tekin um, at lækkingin í oljuprísinum er av. Hóast hann væntandi fer at hækka aftur, verður torført at koma upp um 80 dollarar fyri tunnuna í bræði.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lækkingin í lánsbrævarentunum steðgaði í farnu viku. 10-ára rentan hækkaði 0,07% til 3,86%. Renturnar eru tó ikki farnar at hækka av álvara aftur.

### Partabrøv eru sum heild lækkaði

Partabrøv hava sum heild staðið seg illa seinastu vikuna. Eitt nú eru Norðurlond lækkað 2,7% og Evropa er lækkað 1,9%. Eitt undantak er Danmark, sum er óbroytt seinastu vikuna. Orsøkin er, at A. P. Møller – Mærsk hevur staðið seg væl seinastu vikuna, við eini hækking á 1,2%.

Ein orsøk til lækkingina er, at partabrøv stóðu seg væl frá 13. juni, tá marknaðirnir náddu botnin eftir lækkingina, ið byrjaði fyrst í mai. Frá botninum 13. juni til 4. sep. hækkaði t.d. Evropa yvir 12%. Onnur grund til lækkingina er ótti um, at búskapurin í USA er um at vikna. Havast skal í huga at USA hevur staðið seg væl og at ein lítil afturgongd tí ikki er vandatekin. Samstundis vinna virkini enn góðan pening.

Annars eru ikki tey stóru hagtølini á skránni, og íleggjarar fara tí aftur hesa vikuna at fylgja við gongdini á oljuprísinum.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður evropiski prísvøksturin væntandi í andgletti.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 586,96 | 1,3% | ↑ |
| JPY | 5,00 | 0,2% | ↑ |
| GBP | 1.094,72 | -0,9% | ↓ |
| NOK | 89,69 | -2,1% | ↓ |
| SEK | 80,39 | 0,3% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,02 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 109,17 | -1,9% | ↓ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 570,00 | -1,3% | ↓ |
| KB Trygg Eurostoxx | 104,02 | -1,0% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

Vika 37